# Wellness er við umborð



Fyritøkan Wellness verður við umborð við sera góðum tilboðum uppá neglaviðgerð, manicure og makeup. Eisini verður møguligt at fáa Galvanic Spa, sum strammar húðina upp, økir um blóðrensl og frískar upp við tí sokallaða »rukkustrúkijarninum«. Tryggja tær tíð við at bíleggja áðrenn hjá Wellness tlf. 223312

## Spennandi Second-Hand torg umborð á Norrönu

Fríggjadagin fara vit at royna okkurt heilt øðrvísi – vit fara at hava okkara egna spennandi second-hand torg umborð. Tú hevur heilt vist okkurt plaggið, skógvar, tinganeyst, leikur, møblar, barnaklæði, súkklu, barnavogn, ja hvat sum helst, sum tú heldur er ov gott til at smida burtur, men sum tú sjálv er troytt av ella ikki passar inn hjá tær meira. Tak tað við ella tak eina mynd við, um tingið er ov stórt og sel umborð. Tað er nú, tú hevur høvi at rudda út og kanska fáa nýggj ting, klæðir ella annað inn í títt lív;-). Minst til – vit eiga bara at hava ting, klæðir og annað í húsinum, sum gevur okkum orku – so far bara eina rundu í húsinum beinanvegin, so tú ert klár til Damucruisið;-).



## Festlig Fancy Damuparty

Leygarkvøldið verður lagt upp til tað heilt stóra Fancy Damuparty. Vit stása okkum upp og møtast til ein leskiligan vælkomudrykk í barrini. Síðani fara vit allar til borðs, har kokkurin bjóðar eina lekra 3-rættaða matskrá. Seinni fara vit m.a. at spæla Roulette og Black Jack, fnisa og sussa, syngja karaokee, dansa disko, kjakast og annars bara hava tað stuttligt og hugna okkum saman. Eitt festligt, fancy damuparty av tí slagnum, tú rættiliga kanst gleða teg til og helst fer at minnast aftur á;-)

## Kanna tína heilsustøðu

Nýt einastandandi høvi at kanna tína heilsustøðu við hjálp av AcuGraph. Tað verður Olga Hentze frá Harmony, sum kemur at standa fyri hesum, og fer hon harafturat at bjóða vegleiðing í orku javnvág og geva góð ráð til, hvussu tú kanst betra um tína heilsu. Tað er bara at halda seg framat;-)

## Fá massagu umborð

Møguleiki verður rættiliga at slappa av og økja um kropsligu vælveruna við massagu frá Hervør Lamhauge vøddaterapeuti. Minst til at bíleggja tíð áðrenn, um tú vilt tryggja tær viðgerð á túrinum;-).

## Relax, Fit & Beauty

Tú fært ríkiligt av tíð at slappa av. lesa eina góða bók og ordiliga fáa innheintað tín væl uppiborna Beauty Sleep. Tær frísku kunnu eisini halda venjingina við líka, eitt nú við at taka nøkur tøk niðri í svimjihylinum ella venja í "maskinrúminum" . Aftaná kann man njóta eina løtu í sauna'ini ella fara í Hot Tub.

## Veðrið av tí fagrasta

Vit hava sjálvandi bílagt allar fagrasta veður, soleiðis at vit eisini kunnu njóta nakrar sólstrálur á dekkinum. Ert tú atlíkavæl bangin fyri at fáa sjóverk, skulu vit heilsa og siga, at koffinautin kann kurera sjálvt tann ringasta sjóverkin. Fólk, sum hava roynt Marzine og aðrar tablettir uttan eydnu, hava havt mega succes við Koffinautin. Fæst á apotekunum, so don't worry;-)).



## Brúsandi champagna og frísk jarðber í Esbjerg



Tá vit koma til Esbjerg, verður bussur eftir okkum, sum koyrir okkum niðan í Esbjerg Storcenter. Har verða vit bodnar til brúsandi champagnu og hartilhoyrandi frísk jarðber, áðrenn vit fara at shoppa ella gera tað, okkum nú lystir.

## Lekkur 3 rætta matskrá til Fancy Damuparty - YAMMI

- *Roulada av laksi v/noritang á frískum urtasalati v/lime creme*
- *Heilstoktur oksamørbrad v/sauce bordelaise, portvíns svampum og rótfrugtum*
- *Klassisk Coupe Danoise ísdessert v/sjokulátasauce og vaffel*






## Biograf og Bingo

**Fleiri av teimum nýggjastu filmunum verða við umborð, so nú hevur tú kanska høvi at innheinta tað forsømda. Gjøgnum allan dagin ber til at fara í biograf. Umframt biograf, verður sjálvandi eisini møguleiki at fara á Bingo og kanska vinna onkran góðan vinning.**

## Hvør typa ert tú?

Kom og hoyr um tær 9 vangamyndirnar sambært "Enneagrammið". Tað er bæði stuttligt, spennandi og mennandi. Á túrinum fer Dorthe Gyldenkærne at greiða frá teimum ymisku typunum. Tú kanst rokna við einari rúgvu av AHA-upplivilsum, tá tú lærir um tær ymisku typurnar. Kanska tú heilt skjótt finnur útav, hvør typa tú ert;-).

## Stíltest

***Sum nakað serligt kunnu damurnar umborð fáa eina sonevnd kviktest frá Anniku Johansen og Unu Jacobsen. Kviktestin gonur út uppá at finna útav, hvørji klæðir og hvør frisura klæðir tær. Fyri at finna útav ti,w verður ein test tikin av kropsformi, andlitsformi, frisuru og liti. Harafturat fara tær báðar at geva nøgv góð styleràð. Fyri at tryggja tær tíð til kviktest, kanst tú bíleggja tíð á tel 217455.***





## Zoneterapi

Við zoneterapi kanst tú fáa javnvág aftur í kroppin. Eisini kann viðgerðin hjálpa ímóti pínu og øðrum sjúkueykennum. Tað verður Oda Andreasen, sum á Damucruise fer at geva tær møguleika at njóta gott av zoneterapi. Bílegg gjarna tíð áðrenn.